Dagf. 20. august 2020
HMR J. nr. 20/00694-7

Kaj Leo Holm Johannesen
landsstýrismaður

Svar

upp á

fyrispurning nr. 5/2020 eftir § 52a í tingskipanini viðvíkjandi koronakanningarstøðum frá Jóhannis Joensen, løgtingsmanni

Spurningurin var soljóðandi:

1. Hevur landsstýrismaðurin ætlanir um framyvir at lata upp fleiri ókeypis kanningarstøðir kring landið?
2. Heldur landsstýrismaðurin tað vera rætt, at føroyingar rinda fyri kanningarnar hjá útlendingum? Og ætlar landsstýrismaðurin at broyta hetta?

Svar:

Til spurning 1

Seinastu dagarnar hevur Sjúkrahúsverkið skipað fýra sonevndar støkk-inn kanningarstøðir í ávikavist, Trongisvági, Klaksvík, Tórshavn og í Runavík. Kanningarskipanin er smidlig og atkomulig, og øll fáa bjóðað ókeypis kanningar uttan ávísing.

Týsdagin í síðstu viku var eitt ferðalið við kanningarfólki úti á útoyggjunum Fugloy, Svínoy, Kalsoy, Hesti, Mykinesi, Skúvoy og Stóru Dímun at kanna fólk fyri koronu. Tað er ikki óhugsandi, at hetta ferðaliðið kann gera slíkan túr aftur seinni, um tørvur er á tí.

Starvsfólk í Sjúkrahúsverkinum hava eisini tikið stig til at veita nólsoyingum tilboð um ókeypis kanningar. Harumframt er avbjóðingin á Sandi loyst soleiðis, at kommunulæknarnir síðan mars hava skipað tað soleiðis, at fólk, sum hava havt tørv á at verða kannað fyri koronu, hava fingið tíð til kanning hjá kommunulæknanum. Sjálv potingin hevur tó ikki verið framd inni á læknamiðstøðini, men uttanfyri meðan fólk hava sitið í bili. Soleiðis verður enn gjørt á Sandi.

Spurningurin um fleiri kanningarstøðir hevur verið umrøddur við leiðsluna í sjúkrahúsverkinum. Niðurstøðan er, at vit við hesum kanningartilboðum røkka væl út til allar borgarar, sum ynskja at lata seg kanna fyri koronu.

Allarflestu borgarar kunnu nú koma til eina kanningarstøð innan 40-45 minuttir, sum má metast at vera ein nøktandi tænasta.

Tað er eingin loyna, at bíðitíðin fyrstu tíðina hevur verið órímiliga long, og hetta hevur verið ein avbjóðing fyri øll, sum hava latið seg kannað, uttan mun til hvar í landinum tey búgva. Tað hevur verið væntandi, at stóra trýstið fór at hæsa av, og longu nú eru bíðirøðirnar og bíðitíðirnar munandi styttar.

Landsstýrismaðurin metir tí ikki, at tað í verandi støðu er tørvur á at skipa fleiri nýggjar kanningarstøðir kring landið.

Til spurning 2

Landsstýrismaðurin metir, at tað er rímiligt at taka gjøld frá ferðafólki til koronakanningarnar. Landsstýrið hevur í fleiri umførum umrøtt spurningin um at taka gjald frá ferðafólki til hesar kanningar.

Sambært § 28 í epidemilógini rindar landsstýrið allar útreiðslur eftir lógini. Heimild er sostatt ikki í galdandi føroysku epidemilóg til at taka gjøld frá ferðafólki fyri koronakanningar. Samstundis hevur málsviðgerðin víst, at tað ikki er møguligt at broyta hesa áseting í epidemilógini.

Landsstýrið kannar tí, um heimild kann fáast innan onnur málsøki, sum landsstýrismaðurin í heilsumálum ikki umsitur. Hetta arbeiðið er enn ikki komið á mál.

Heilsumálaráðið, 21. august 2020

Kaj Leo Holm Johannesen
landsstýrismaður